

# HALLÓ



## *Eddie Jacobsen*
Gittarleikari í SIC

**Hvat gert tú nú?**
Eg venji í fullspeed saman við SIC. Vit hava útgávukonsert 21. august og venja tí hvønn dag. Hetta krevur nógv, tí vit hava eitt krav til okkum allar um, at fløgan skal verða spæld í gjøgnum einaferð, áðrenn nakran steðg. Og fløguna venja vit ígjøgnum tvær ella tríggjar ferðir hvønn dag.

**Gleðir tú teg til útgávukonsertina?**
Ja, for søren! Vit hava ikki spælt eina konsert síðani november í fjør, so tað kittlar í fingrunum hjá okkum øllum so spentir vit eru. Serliga tí, at vit í fjør vóru øgiliga aktivir við bæði eini turné og øllum festivalunum.

**Hví hava tit spælt so lítið í ár?**
Tað eru nøkur ting, sum spæla inn. Vit hava ikki verið úti um okkum, tí vit hava brúkt alla orkuna upp á fløguna. Samstundis er tað langt síðani, at vit góvu nakra fløgu út, so vit hava ikki verið so aktuellir. Men nú koma vit við nýggjari fløgu og gleða okkum at spæla aftur!

# Klipp! Klipp!




Heystið nærkast

## Í MORGIN

13/16 °C



6-11 m/s — 4-9 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 13 og 16 stig.

## MIKUDAGIN

13/16 °C



3-8 m/s — 5-10 m/s

Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin minni vindur av norði. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.

## HÓSDAGIN

13/16 °C



5-10 m/s — 1-6 m/s

Fleyr til gul av útnyrðingi, seinnapartin upp í stívt andøvsgul av vestri. Yvirhøvut turt og sólglottar og hitin millum 13 og 16 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin lot til andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt, men leygardagin upp í stívt andøvsgul av norði og ælingur. Hitin millum 9 og 13 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa. Í útsynning úr Føroyum fer spakuliga suðureftir og brúgvalgið við Føroyar fer somuleiðis suðuredtir.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið vestan fyri Hebridurnar fer spakuliga eystureftir og brúgvalgið sunnan fyri Føroyar stendur mestsum í stað.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 83 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

3. august — Seinna kvarter
10. august — Tendring/mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9. aug. | 06:33 | 19:00 | 05:33 | 18:00 | 05:48 | 18:15 | 08:33 | 21:00 | 09:33 | 22:00 | 04:48 | 17:15 | 03:48 | 16:15 | 06:48 | 19:15 | 07:48 | 20:15 | 06:18 | 18:45 | 07:33 | 20:00 |
| 10. aug. | 07:25 | 19:50 | 06:25 | 18:50 | 06:40 | 19:05 | 09:25 | 21:50 | 10:25 | 22:50 | 05:40 | 18:05 | 04:40 | 17:05 | 07:40 | 20:05 | 08:40 | 21:05 | 07:10 | 19:35 | 08:25 | 20:50 |
| 11. aug. | 08:15 | 20:41 | 07:15 | 19:41 | 07:30 | 19:56 | 10:15 | 22:41 | 11:15 | 23:41 | 06:30 | 18:56 | 05:30 | 17:56 | 08:30 | 20:56 | 09:30 | 21:56 | 08:00 | 20:26 | 09:15 | 21:41 |
| 12. aug. | 09:06 | 21:31 | 08:06 | 20:31 | 08:21 | 20:46 | 11:06 | 23:31 | - | 12:06 | 07:21 | 19:46 | 06:21 | 18:46 | 09:21 | 21:46 | 10:21 | 22:46 | 08:51 | 21:16 | 10:06 | 22:31 |
| 13. aug. | 09:55 | 22:20 | 08:55 | 21:20 | 09:10 | 21:35 | 11:55 | - | 00:31 | 12:55 | 08:10 | 20:35 | 07:10 | 19:35 | 10:10 | 22:35 | 11:10 | 23:35 | 09:40 | 22:05 | 10:55 | 23:20 |